## Skjótt syftir seiðir – og tunga takið

# Veðurlags-ráðstevna

**Nú virkisætlanin »Skjótt syftir seiðir og tunga takið«, hvørs endamál er at minka um útlátið av veðurlagsgassi, er liðug, skipar Innlendismálaráðið fyri ráðstevnu á Hotel Føroyum 15. desember 2008.**

*Hvat kunnu vit gera fyri at minka um útlátið av veðurlagsgassi her og nú – og hvørji átøk taka drúgvari tíð?*

Ráðstevnan er ókeypis. Boða frá luttøku í seinasta lagi 12. des. kl. 12 á 35 80 94 ella á kristvorp@imr.fo

**Skrá:**

09.00 Vælkomin
09.30 Setan, Annika Olsen, landsstýriskvinna
09.40 *Útlát í Føroyum og altjóða bindingar,* Suni Petersen, Umhvørvisstovan
10.00 *Skjótt syftir seiðir og tunga takið,* Jóhanna Olsen, Umhvørvisstovan
10.40 Steðgur
11.00 *Orkuframleiðsla og -veiting,* Terji Durhuus, Jarðfeingi
11.25 *Bygningar og sethús,* Ole Jensen, Landsverk
11.45 Ábit
13.00 *Flutningur og ferðsla,* Armgarð Steinhólm, Landsverk
13.20 *Tiltøk í vinnuni,* Marita Rasmussen, Vinnuhúsið
13.40 *Tiltøk í fiskivinnuni,* Viberg Sørensen, Reiðarafelagið
14.00 Steðgur
14.15 *Orku- og umhvørvisstýring – eitt hent amboð hjá vinnuni,* Eyðfinn Egholm, P/F MEST
14.35 *Grøn orkubúskaparlig útlit,* Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur
14.55 *Vegurin fram,* Kaj Leo Johannesen, løgmaður
15.05 Tikið verður samanum, Jákup Veyhe

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

SENDISTOVAN

[endurlýsing]

# KT-umsitari til Snarskivuna

Tín uppgáva verður at taka stig til nýggjar og menna verandi KT-skipanir á Snarskivuni, soleiðis at alsamt størri partur av uppgávunum á deildini verða stýrdar á ein nýmótans og brúkaravinarligan hátt fyri bæði kundar og umsiting.

Ætlanin er ikki, at tú skalt forrita nýggjar KT-skipanir, men tú skalt hava hegni til KT, duga at seta orð á hvørjar skipanir kunnu stuðla undir arbeiðinum á Snarskivuni, og saman við veitarum standa fyri menning, røkt og undirvísing í slíkum.

**Snarskivan**
er tænastuliðið millum Tórshavnar kommunu og borgaran. Snarskivan hevur ábyrgd av journalskipanini, grundstykkjalistanum, fólkayvirlitinum, barnaansingini, post- og telefonmóttøkuni og vørubílegging, umframt at deildin loysir eina røð av øðrum málum fyri fyrisitingina hjá kommununi. Í Snarskivuni starvast 11 fólk.

**Tínar førleikar**
hevur tú nomið sum teldustøðingur, ella gjøgnum aðra viðkomandi útbúgving og/ella royndir, ið geva líknandi førleika.

Tú hevur góðan málkunnleika í føroyskum, donskum og enskum.

Tú dugir at nýta øll vanlig telduforrit og megnar at stýra og samstarva um eini verkætlan frá byrjan til enda.

**Tínir eginleikar**
eru ágrýtni, evnini at standa á egnum beinum og ein jaligur hugburður mótvegis avbjóðingum og lívinum sum heild.

**Tínir møguleikar**
eru at gerast partur av einum spennandi og dynamiskum arbeiðsplássi við avbjóðandi uppgávum, har trivnaður og starvsfólkarøkt fær høga raðfesting, og møguleikarnir fyri persónligari menning eru góðir.

**Tín løn**
verður í 5. flokki hjá Starvsmannafelagnum, um lýstu førleikakrøvini eru lokin.



Starvið verður sett skjótast gjørligt, ella eftir nærri avtalu við rætta umsøkjarin.

**Tín umsókn**
skal saman við prógvum og viðmælum vera hjá Tórshavnar kommunu, Postsmoga 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 12. desember 2008.

Merkið umsóknina »KT-umsitari til Snarskivuna«.

Upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Rók Tummasarson, deildarleiðara, telefon 28 46 44, ella epost: rokur@torshavn.fo

Tórshavnar kommuna